# FØROYINGAR OG GRØNLENDINGAR EIGA AT SAMSTARVA BETUR

**Samvinna. -Tað undrar meg stórliga, at tað ikki er størri samstarv millum Føroyar og Grønland. Samstarv verður mest umrøtt í veitslurøðum heldur enn í ítøkiligari samvinnu millum báðar tjóðir. Oljufund kunnu vera lykilin til meira sjálvstýri til tjóðirnar í Norðuratlantshavi heldur Lars Emil Johansen, fólkatingsmaður og fyrrverandi landsstýrisformaður í Grønlandi.**

Jan Müller

Í meira enn 100 ár hava føroyingar verið í tøttum samstarvi við grønlendingar serstakliga á fiskivinnuøkinum. Nú báðar grannatjóðirnar í Norðuratlantshavi hava sett leiting eftir olju og gassi út í kortið eru nýggir møguleikar fyri samvinnu. Ein av teimum royndu grønlendsku politikarunum, fyrrverandi landsstýrisformaður og nú fólkatingsmaður fyri Siumut eftirlýsir eitt meira hjartaligt og gevandi samstarv, har oljuvirksemi eisini kann vera ein partur. 2. desember setti Grønland hol á eitt nýtt kapittul í royndunum at finna svarta gullið í undirgrundini, tá sjey oljufeløg fingu tillutað loyvi í Vesturgrønlandi, júst 10 ár eftir at tey fyrstu leitiloyvini vórðu latin í Føroyum.

### Stór fyrireiking

*Sosialurin hevur spurt Lars Emil Johansen, um tað er ein góður útviklingur fyri Grønland, at tey stóru oljufeløgini nú standa í bíðirøð at sleppa at leita eftir olju við Grønland?*

– Ja, tað haldi eg so avgjørt. Tað er eitt úrslit av einum politiskum arbeiði, sum er gjørt yvir fleiri ár, og sum eg sjálvur var við til at seta skjøtil sum landsstýrisformaður. Tað skuldi gerast eitt stórt arbeiði fyri at vekja áhugan hjá útlendskum oljufeløgum fyri okkara undirgrund. Tað hevur tikið 20 til 25 ár. Eg kann bara vera nøgdur við gongdina og hesa hátíðarløtuna, tá vit lata útlendsku oljufeløgunum síni loyvi.

Lars Emil Johansen vísir eisini á gongdina øll hesi seinastu árini, har størri og størri fokus er sett á Grønland orsakað av ymsum mineralum og seinni eisini olju, nú fleiri tekin eru um, at olja finst í undirgrundini.

– Fyrstu boringarnar hjá skotska oljufelagnum Cairn Energy benda eisini á, at tað finst olja í undirgrundini. Spurningurin er bara, hvussu stórar oljugoymslurnar eru og hvar tær eru. Sjálvur havi eg alla tíðina hildið, at tað er bara ein spurningur um tíð, til oljan verður funnin. Tað segði eg eisini, tá eg tók meg aftur sum landsstýrisformaður fyri 14 árum síðani. Og okkurt bendir á, at tíðin er komin ella er við at nærkast.

### Broytingar

*Hvussu heldur Lars Emil Johansen, at stór oljufund fara at broyta Grønland?*

– Stór olju- og gassfund fara at ávirka og broyta Grønland markant. Vit mugu verja okkum móti møguligum óhepnum avleiðingum. Líka mikið hvat tú finnur í undirgrundini – olju, gass ella mineralir, so mugu vit seta tey neyðugu umhvørviskrøvini, og tað skulu vera tey mest víðgongdu krøv, ið hugsast kunnu. Umhvørvisliga eru vit í Grønlandi kanska tað mest viðkvæma økið í øllum heiminum. Hesi krøv skulu eisini fevna um at seta pengar av til at rudda upp, um okkurt skuldi gingið heilt galið.

Hann vísir á, at bæði sosialt og búskaparliga fer ein oljuvinna eisini at hava ávirkan á Grønland. Samfelagsliga og politiska ávirkanin er kanska tann, ið vit í dag geva minst gætur, td. um túsundtals fremmandir arbeiðarar koma henda vegin. Eg haldi vit eiga at geva tí socioøkonomisku ávirkanini, sum oljan fer at hava á grønlendska samfelagið, meira ans enn vit hava gjørt higartil.

Lars Emil Johansen

> **» Føroyingar og grønlendingar eiga at finna saman og finna eitt felags stev í royndunum at koma út úr donsku grundlógini og royna at finna fram til eina »modus vivendi« støðu í sambandi við framtíðar viðurskifti við Danmark**

ivast tó onga løtu í, at grønlendingar eins og aðrar tjóðir eiga at gera tað tey eru ment fyri at finna møgulig ráevni í undirgrundini. -Eru ríkidømi í okkara undirgrund, so vil tað vera heilt tápuligt at vera bundin at blokkinum úr Danmark. Eiga vit ríkidømi í undirgrundini, so skulu vit so sanniliga eisini troyta tey. Men vit mugu framhaldandi seta stór krøv til umhvørvi, heilsu og ta ávirkan henda vinna fer at hava á samfelagið. Her hugsi eg eisini um krøvini til útbúgving og at varðveita okkara mentan.

### Sjálvberandi búskap

*– Sær tú oljuna sum lykilin til eina sjálvstøðuga grønlendska tjóð?*

– Í hvussu er ein sjálvberandi grønlendskan búskap. Tað er eisini ein spurningur um vilja og um útbúgving. Tú verður ikki sjálvstøðugur, um tú bara vil hava pengar. Kanska beint tvørturímóti. Tú kanst blíva bundin at pengunum. Tú mást politiskt vera árvakin um, at tað skal vera vegurin til sjálvstýri. Tú skal eisini orða sjálvstýri og sjálvræði sera neyvt. Um sjálvstýri bara er at útrópa republikkina Grønland í morgin ella ein dag, so verður tað ikki eitt veruligt sjálvstýri men meira ein isolatión í mun til restina av heiminum.

Lars Emil Johansen heldur eisini, at grønlendingar skulu velja sínar vinir, tá teir eru fátækir. Tá fær tú teir bestu og røttu vinirnar. Tá tú er ríkur er eingin trupulleiki at fáa vinir, men sum kanska ikki eru so nógv vinir kortini.

– Eg haldi tí, at Grønland skal velja sínar vinir, áðrenn vit hava fingið oljuinntøkur. Eg haldi eisini tað hevur týdning, at Grønland ikki brúkar allar sínar oljuinntøkur. Ein alt ov víðgongd, markant broyting av tí grønlendska samfelagnum fer ikki at vera sunn. Tann fyrsti parturin av inntøkunum skal avloysa blokkin úr Danmark, soleiðis at Grønland ikki er bundið at hesum tilskotinum. Harnæst skal talan verður um at økja um vælferðina og fremja eina útjavning av teimum sera stóru sosialu ójavnunum. Síðani eina betran av útbúgvingarstovnunum, íbúðunum, heilsuviðurskiftunum, fleiri fólk í arbeiði og eina menning av tænastufakunum. Haraftrat er tað sera týdningarmikið, at vit leggja oljupengar í ein grunn, sum kann koma komandi ættarliðum til góðar.

Tað er soleiðis við oljuni og øðrum virðum í undirgrundini, at hesi ikki endurnýggja seg. Ein dag er tómt, hóast hesin dagur kanska liggur langt frammi í tíðini. Tí er sera umráðandi, at talan ikki verður um eina risastóra veitslu, tá oljan fer at oysa upp úr undirgrundini.

### Oljan avloysa blokkin

*Hvussu heldur Lars Emil Johansen, at ein oljumenning kann vera við til at broyta viðurskiftini millum Grønland og Danmark.*

– Hon nýtist ikki at broyta nakað. Hon kann tó broyta støðuna so, at vit vera ikki so bundin at blokkinum. Teir flestu grønlendingar eru hugaðir fyri at hava góð viðurskifti, relatiónir til Danmark, eisini tann dag vit gerast óheft og ikki nýtast at fáa danskar pengar. Og tann dag vit ikki longur hava brúk fyri at lata Danmark samráðast um okkara uttanríkis- ella trygdarpolitikk. At broyta samstarvið og relatiónirnar, sum hava verið millum Grønland og Danmark gjøgnum 300 ár er ikki bara ein spurningur um politiskan ella búskaparligan førleika men eisini eisini ein spurningur um vinarlag millum menniskju og ein lívfrøðiligan felagsskap, og tað er nakað vit mugu virða. Men vit skulu hava sjálvstýri í størstan mun, og vit skulu klára okkum sjálvi bæði politiskt og búskaparliga. Sum lond á jøvnum føti mugu vit samstarva, men vit mugu út av donsku grundlógini. Vit skulu ikki vera eitt hjáveldi.

Lars Emil Johansen vísir til skipanina við sjálvbodnum felagsskapi "Free association", sum merkir ríkisfelagsskap uttan at verða bundin at eini grundlóg. Man kann t.d. avtala, at man rekur ein felags uttanríkis- og trygdarpolitikki. Og man kann eisini avtala at reka ein felags útbúgvingarpolitikk, um tað er tað man vil.

– Eg havi arbeitt fyri sjálvstýri og sjálvræði øll tey 40 árini eg havi verið í politikki. Vit fingu heimastýrisskipanina, sum var fyrsta stigið móti sjálvstýri. Nú hava vit so tikið enn eitt stig við sjálvsstýrislógini, og næsta stigið aftur verður fult sjálvstýri.

The grand old man í grønlendskum politikki heldur fyri, at sjálvstýri er ikki



*Sjey altjóða oljufeløg vilja gera stórar íløgur í oljuleiting í Grønlandi. 2. desember fingu tey handað leitiloyvini í Nuuk, har eisini Sosialurin var til steðar*